LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postrúm 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 1. juli 2007
J. nr.: 25/15435-3

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-112/2024 eftir § 52 a í tingskipanini um logning í Føroyum frá Steffani Klein Poulsen, løgtingsmanni.

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Verður arbeitt við at seta reglur í gildi, sum svara til reglurnar í donsku "logningsbekendtgørelsen"?
2. Um ja, hvat restar í fyri at koma á mál við hesum?
3. Um nei, hvør er orsøkin til, at landsstýrismaðurin ikki ynskir at seta tílíkar reglur í gildi?

Svar:

Til spurning 1:
Løgmálaráðið arbeiðir við málinum at seta í gildi reglur um logning í Føroyum.

Arbeitt verður við at seta í gildi eina skipan, sum hevur við sær, at fjarskiftisfyritøkur skulu skráseta og goyma upplýsingar um nýtsluna hjá endabrúkarum á internetinum, t.d. IP-adressur.

Slík skipan kann setast í gildi í Føroyum við at seta í gildi kunngerð við heimild í rættargangslógini. Av tí at talan er um felagsmál samstarvar løgmálaráðið við danska løgmálaráðið um hetta.

Til spurning 2:
Ein skipan, sum umrødd í svari til spurning 1, áleggur fjarskiftisfeløgum í Føroyum skyldu at skráseta og goyma ávísar upplýsingar í eitt ávíst tíðarskeið. Áðrenn slík skipan kann setast í gildi í Føroyum er tørvur á at fáa greiðu á, um fjarskiftisfyritøkurnar hava neyðugu tøkniligu útgerðina at skráseta og goyma slíkar upplýsingar. Løgmálaráðið hevur sett seg í samband við fjarskiftisfyritøkurnar í Føroyum hvat hesum viðvíkur og tá ið greiða er fingið á hesum, verður farið víðari við at seta reglurnar í gildi í Føroyum.

Til spurning 3:
Víst verður til svar til spurning 1.

Løgmálaráðið 1. juli 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður